## Fáar kvinnur stjórar

Tað tykist framvegis vera tungt hjá donskum kvinnum at fáa leiðarastarv í teirri almennu umsitingini. Ein kanning, sum Ugebrevet A4 hevur gjørt, vísir, at av teimum 104 kommunustjórunum í Danmark eru bara níggju kvinnur. Ein teirra er Birgit Fogh Rasmussen, sum er stjóri í Lemvig kommunu. Hon harmast støðuna, men er als ikki skelkað av kanningarúrslitinum. Hon sigur, at tann vanliga myndin av einum stjóra er framvegis ein maður í klædningi, og hon viðgongur, at hetta er eisini tann stjóramyndin, sum hon sjálv sær fyri sær.



## Vilja hava somu stjórn

Fyri nøkrum fáum døgum síðani vísti ein meiningakanning í Noregi , at teir borgarligu flokkarnir fara at fella stjórnina hjá Jens Stoltenberg á valinum tann 14. september. Men um vikuskiftið vísti ein onnur kanning, at 46 prosent vilha hava stjórnina at halda fram, meðan 39 prosent vilja hava eina aðra stjórn. Úrslitið av kanningini var óvæntað, tí tað vísir, at tey flestu hava hug at atkvøða fyri andstøðuni, men at tey kortini vilja varðveita verandi stjórn. Valgranskarar halda orsøkina vera, at teir borgarligu flokkarnir kunnu ikki semjast um at skipa stjórn, tí summir vilja halda Framburðsflokkinum uttanfyri.



*Kring alt landið fara heili 725 børn í skúla fyri fyrstu ferð í dag*

# Eitt fyrsta floks vegamót

**Við leysum tonnum, strømmum flættum og rungandi tómum skúlataskum tysja tey so forvitin og spent í skúla í dag.**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Bæði hjá børnum og foreldrum er fyrsti skúladagur eitt av størstu vegamótunum í lívinum. Á hvørjum ári senda vit hundraðtals sjey ára gomul inn í skúlarnar við teirri vón, at tey fáa eina góða skúlagongd við nógvum succesupplivingum.

Kring alt landið fara heili 725 børn í skúla fyri fyrstu ferð í dag. Í ár verða heili 67 fleiri næmingar í føroysku skúlunum enn í fjør. Tilsamans fara 725 næmingar í 1. flokk í dag, harav 306, ella 42 prosent, í Tórshavnar kommunu. Í einum skúla, Tjørnuvíkar skúla, fer bara ein næmingar í 1. flokk; í fjør vóru heili níggju skúlar við bert einum næmingi. Fyrraári fóru 754 næmingar í 1. flokk og árið fyri 684.

Tilsamans ganga 6920 næmingar í fólkaskúlanum komandi skúlaár. Síðsta skúlaár var talið 7061, fyrraárið 7273 og árið fyri 7367.

Vit ynskja børnum og lærarum eitt gott skúlaár.





*Í Hoyvíkar Skúla byrja 43 næmingar í fyrsta flokki í dag, 13 gentur og 30 dreingir. Tey ganga øll í sama flokki, sum hevur fýra lærarar um seg*

*Mynd: Beinta Haraldsen*